## Meiri ognarskatt

OECD heldur ikki, at teir politisku myndugleikarnir í Noregi hava gjørt nóg mikið fyri at tálma avleiðingunum av búskaparkreppuni. Paul O'Brien, búskaparfrøðingur hjá OECD, segði í gjár, at tað almenna kann spara á ymsum økjum, og hann nevndi sum dømi, at Noreg hevur lutfalsliga nógvar smáar skúlar og lutfalsliga nógv smá sjúkrahús samanborið við onnur lond. OECD-búskaparfrøðingurin helt ikki, at norsku politikararnir kunnu hækka tann vanliga skattin, men hann helt tó, at norðmenn kunnu rinda meiri ognarskatt. Men tað ætlar stjórnin ikki, sigur Sigbjørn Johnsen, fíggjarmálaráðharri.



## Darling eigur málið

Bretski forsætisráðharrin, Gordon Brown, fer ikki at taka sær av trætuni millum íslendingar og bretar um, hvussu íslendingar skulu endurrinda Icesave-skuldina. Sunnudagin mælti íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, bretska forsætisráðharranum til at fara inn í málið fyri at fáa gongd á. Men talsmaðurin hjá Gordon Brown svaraði í gjár, at Alistair Darling, fíggjarmálaráðharri, hevur málið um Icesave um hendi, og at samráðingarnar við Ísland hoyra undir fíggjarmálaráðið.

# Vit verða klár til fyrsta apríl



*- Tað er ikki verri í ár enn tað plagar at vera og tí finna vit eisini semju hesuferð, sigur Kaj Leo Johannesen, løgmaður*

**Løgmaður tvíheldur um, at ósemjan ímillum samgonguflokkarnar um fíggjarlógina fyri næsta ár, er ikki størri enn tær plaga at vera og tí verður semja eisini funnin í ár**

FÍGGJARPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta er ikki øðrvísi enn tað plagar at vera!

Kaj Leo Johannesen, løgmaður, dugur ikki at síggja, at ósemjan ímillum samgonguflokkarnar um fíggjarlógina fyri næsta ár, eru verri enn tær plaga at vera, tá ið fíggjarlógir skulu gerast.

Og hann ivast onga løtu í, at samgongan verður klár at leggja fíggjarkarmarnar fyri 2011 fyri Løgtingið tann 1. apríl, sum er seinasta evstamark.

Seinastu dagarnar hevur Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum lagt sítt uppskot fyri samgonguna, har hann bæði mælir til sparingar og at avgjøld av ymsum slagi verða hækkað.

Hinvegin vil Fólkaflokkurin ikki hoyra talan um at hækka avgjøld og í Rás2 í gjár váttaði Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins, at ósemjan ímillum samgonguflokkarnar er djúpari hesuferð, enn tær hava verið og hann vildi ikki útihýsa nývali.

### Mótbrekkan er ikki so brøtt

Men alt hetta vil løgmaður ikki kennast við.

Hann váttar, at Fólkaflokkurin hevur gjørt sínar viðmerkingar til uppleggið hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, men talan var ikki um eitt beinleiðis uppskot.

Men eins og Fólkaflokkurin hevur gjørt sínar viðmerkingar, hevur eisini Sambandsflokkurin gjørt sínar viðmerkingar

- Eg ivist ikki í, at tá ið samgonguflokkarnir seta seg saman, fara sjónarmiðini hjá teimum ymsu flokkunum at renna saman.

Hann er serliga styrktur í hesi trúnni eftir at Búskaparráðið legði sína frágreiðing fram í gjár.

- Frágráðingin vísir at glottar eru fyri stavn og at mótbrekkan er ikki so brøtt, sum vit hildu fyri einum hálvum ári síðani, sigur Kaj Leo Johannesen.

Búskaparráðið mælir til, at almennu útreiðslurnar mugu ikki hækka meiri enn 2% um árið tey næstu árini.

- Fyri einum hálvum ári síðani varð niðurstøðan, at almennu útreiðslurnar mugu lækka 2% um árið, so nú sær munandi ljósari út.

Harafturat skulu politisk tiltøk setast í verk fyri 100 milliónir um árið hesi næstu trý árini.

- Samstundis eru tekin um, at vøkstur er í búskapinum og endamálið er framvegis at hava javnvág á fíggjarlógini um nøkur heilt fá ár.

### Sparingar og hægri inntøkur

Løgmaður sigur, at javnvágin skal fáast í fíggjarlógina bæði við sparingum, hækkandi inntøkum og við bygnaðarbroytingum.

Men hann vil ikki greiða frá smálutunum.

- Tað fara vit tríggir samgonguflokkarnir at finna semju um næstu tíðina, sigur hann.

Hann sigur, at sjálvandi verður tað tórført, men viljin at finna semju er stórur og flokkarnir eru ábyrgdarfullur og kenna avbjóðingarnar, so hann ivast ikki í, at tað tað fer at eyndast.

- Tað eru nøkur helt fá, grundleggjandi viðurskifti, sum flokkarnir eru ósamdir um, men tað finna vit semju um. Men tað er greitt, at verður lorað onkra staðni, skal tað inn aftur eina aðrastaðni, tí talið á síðstu reglu skal passa.

Hinvegin leggur hann dent á, at tað verður ikki talan um at skerja heilsuverk, almannaverk, skúlaverk og aðrar grundleggjandi vælferðartænastur.

### Mugu fylgja serfrøðini

Men nú hevur Fólkaflokkurin sagt kortanei til summi tilmæli frá Búskaparráðnum eitt nú tilmælini um at hækka avgjøld á vinnulív og á einstaklingar. Flokkurin sigur eisini kortanei til at avtaka sjómannafrádráttin.

- Tað er í lagi, at flokkarnir í útgangsstøðinum siga kortanei til ymisk tiltøk. Men vilja vit ikki fylgja serkunnleikanum, mugu vit eisini gera okkum greitt, hvat tað er fyri eitt samfelag, vit vilja hava.

Hann staðfestir eisini, at Fólkaflokkurin hevur sagt seg sinnaðan at leggja seg upp at tilmælinum hjá Búskaparráðnum.

- Tað fegnist eg um, tí nú vænti eg eisini, at Fólkaflokkurin ger tað, tá ið Búskaparráðið mælir til at hækka ymisk avgjøld, bæði hjá vinnulívinum og hjá meiniga borgaranum.

- Men nú er tað ikki sagt, at øll tilmælini hjá Búskaparráðnum verða sett í verk. Verða onkur tilmælið strikað, mugu onnur tiltøk setast í verk, sum geva tað sama fíggjarliga úrslitið, tí endaliga úrslitið á fíggjarlógini skal vera tað sama, sigur Kaj Leo Johannesen.

# Løgmaður stingur ikki halan ímillum beinini

**Tað er synd, at Magni Laksáfoss altíð er so fornermaður, heldur løgmaður**

SAMGONGUSTEV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg fari ikki at útskriva løgtingsval í ótíð.

Tað staðfestir Kaj Leo Johannesen, løgmaður.

Seinastu dagarnar eru komið fram í ljósið, at ósemjan ímillum samgonguna um fíggjarpolitikkin er rættiliga stór.

Serliga sjónskt var tað á Rás2 í gjár, tá ið Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins, var meiri svartskygdari enn hann plagdi.

Hann segði seg vóna eina semju, men viðgekk, at hann hevði onki at hava tað í og hann kundi ikki útihýsa, at tað verður neyðugt við vali.

Fyrr í vikuni staðfesti Magni Laksáfoss í Sosialinum, at tað er neyðugt við broytingum í samgonguni, tí hendan samgongan hevur mist trúvirðið og er ikki før fyri at loysa trupulleikarnar.

- Nýval er ikki ein møguleiki, eg hugsi um.

At útskriva nýval metir Kaj Leo Johannesen sum at stinga halan ímillum beinini og tað er ímóti hansara prinsippum.

- Veljarin hevur okkum ábyrgd og mótvegis veljarunum er tað ikki rætt at stinga halan ímillum beinini, tá ið tað lotar ímóti.

- Vit eiga at gera tað til okkara meginreglu, at eitt valskeið varar í fýra ár.

Men kann tað koma upp á tal at umskipa samgonguna og fáa onkran flokk uppí, sum er meiri sinnaður enn Fólkaflokkurin at áseta tilfeingisgjald, avtaka sjómannafrádrátt og vil hækka avgjøld á vinnu og einstaklingar?

- Tað havi eg onga viðmerking til, men tað er greitt, at vit mugu øll lyfta í felag, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Synd fyri Magna

Hann er heldur ikki samdur í, at samgongan hevur mist trúvirðið.

- Seinasta veljarkanningin vísti júst tað øvugta, tí vit hava varðveitt okkara undirtøku, sum ein av kanska tveimum, trimum stjórnum í øllum Evropa.

- Tað er harmiligt, at ein evnaríkur politikari Magni Laksáfoss er so fornermaður, at hann heldur vil stinga kílar inn í samgonguna, heldur enn at lyfta saman við okkum.

Hinvegin staðfestir Kaj Leo Johannesen, at teir politikarar, sum ikki vilja lyfta saman við restina av samgonguna, men eru í sjálvdrátti, hava heldur onga ávirkan á førda politikkin, so einfalt er tað.

- Tann, sum er í samgongu, tekur eina byrgd á seg og tað eiga vit at liva upp til.